# Fogh í Suðuroy

**Hósdagin vitjaði danski forsætisráðharrin í Suðuroy**

VITJAN

*Orð og myndir:Heri á Rógvi*



*Fogh heilsar Paula: Anders Fogh Rasmussen heilsar upp á Paula Einarsson, býráðslim á Tvøroyri.*

**Tvøroyri:** Beint eftir klokkan tíggju hósmorgunin lendi danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, á tyrlupallinum í Froðba. Við í tyrluni var eisini konan, Anne-Methe Rasmussen, og Anfinn og Berghild Kallsberg.

Tað var av allar fagrasta veðrið í Froðba. At taka ímóti var borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen. Konan Joan og lítla dóttirin Haldis vóru eisini komnar at taka ímóti, og Haldis handaði Anne-Mette Rasmussen blómur.

Hýrurin var góður á øllum. Bæði forsætisráðharrin og løgmaður skemtaðu og lótu væl at túrinum við tyrluni.

Áðrenn farið varð við bili til Tvøroyrar á fund, so heilsaði forsætisráðharrin upp á fleiri av býráðslimunum á Tvøroyri.

Stutt eftir byrjaði fundurin millum Anders Fogh Rasmussen og løgmann, har serliga yvirtøkulógin skuldi var á skránni.

Seinni var fylgi við forsætisráðharranum í kirkjuni, har Àsi Jacobsen vísti runt. Eisini var ferðalagið á sjúkrahúsið á Tvøroyri.

Eftir døgurða í Ítróttarhøllini í Trongisvági gekk leiðin til Vágs og Sumbiar.

Bæði Anders Fogh og konan Mette søgdu vera sera glað fyri at vera í Suðuroynni og hildu fyri, at her er sera vakurt, og nú byrjaði at lýsa aftur, eftir drúgva túrin í mjørkanum.

Av tí, at blaðið fer til prentingar kl. 14, so fingu vit ikki alt við, men ein longri frásøgn verður í blaðnum í morgin.



*Haldis handar blómur: Lítla dóttur borgarstjóran, Haldis Michelsen, slapp at geva Anne-Mette Rasmussen blómur. Forsætisráðharrahjúnini vóru ógvuliga glað fyri føroyska búnan*



*Anders Fogh Rasmussen spurdi dúgliga Kristin Michelsen um ymiskt*



# Fogh: Hernaðarlógir vera standandi

**Tað kemur ikki upp á tal, at hernaðarlógirnar, sum eru settar í verk fyri Føroyar ímóti løgtingsins vilja, vera tiknar av aftur. Tað gjørdi Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, púra greitt eftir fundin á Tvøroyri við Anfinn Kallsberg**

HERNAÐARMÁL

*Ingi Rasmussen*



*Anders Fogh Rasmussen og Anfinn Kallsberg fundaðust í ein lítlan tíma undir vaðingini í býráðshúsinum á Tvøroyri*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Á fundinum á Tvøroyri millum løgmann og forsætisráðharran á Tvøroyri hósdagin, reisti Anfinn Kallsberg spurningin um nógv umrøddu hernaðarlógirnar, sum danska stjórnin hevur sett í verk fyri Føroyar uttan samtykt frá Føroya løgtingi.

Lógirnar eru brot á eina siðvenju, eru flest øll samd um, og Løgtingið hevur einmælt samtykt at heita á donsku stjórnina um at taka tær av aftur. Men tað kemur ikki upp á tal, slær Anders Fogh Rasmussen rimmarfast.

– Eg vildi ynskt, at málið var viðgjørt øðrvísi, og eg skilji væl, at tað hevur vakt sterkar kenslur í Føroyum. Men mítt greiða sjónarmið er, at danska fólkatingið hevur sett hesa lóggávu í verk fyri alt ríkið, og tað er mín skylda at syrgja fyri, at tær vera settar í gildi. Verjumál eru felagsmál, sum Danmark umsitur fyri alt ríkið, og tí má lóggávan vera eins í øllum trimum londunum, segði Anders Fogh Rasmussen.

Spurdur beinleiðis, um hann vildi virka fyri, at lógirnar vóru tiknar av aftur, svaraði hann avgjørdur: »Bestemt ikke«. Men hann viðgekk kortini, at málið var illa handfarið frá danskari síðu, og nú verður roynt at fyribyrgja, at tað hendir aftur.

– Frameftir fara vit at skipa eina mannagongd, har Føroya løgting og landsstýri verða tikin við, longu áðrenn Fólkatingið samtykkir lógir, so allir partarnir í ríkinum fáa høvi at vera hoyrdir í góðari tíð, segði Anders Fogh Rasmussen.

Men hendir tað aftur, at føroyingar ikki vilja kennast við eina lóg, sum forsætisráðharrin og danska stjórnin halda skal galda fyri alt ríkið, so kann sama støða íkoma aftur, skiltist á Anders Fogh Rasmussen.

– Á einum málsøki sum verjumálum, sum danska stjórnin umsitur vegna alt ríkið, mugu vit hava eina felags lóggávu. Vit kunnu ikki hava hol í lóggávuni. Vilja føroyingar úr tí støðuni, mugu tit úr ríkinum, og tað haldi eg, at tit skulu viðgera innanhýsis í staðin fyri við meg, segði hann knappur á tíðindafundinum.

Anfinn Kallsberg vísti á fundinum við forsætisráðharran á føroysku misnøgdina við, at hernaðarliga lóggávan var sett í verk uttan føroyskt samtykki. Men hann ásannaði í somu vending, at hann fær onki meira gjørt.

– Vit hava eitt demokrati í Føroyum og eitt í Danmark. Verjuøkið er felagsmál, sum liggur undir donskum ræði, og tí havi eg ongan møguleika at seta meg ímóti danska Fólkatinginum. Tað, sum er umráðandi, er at fyribyrgja, at støðan kemur íaftur, tí hon setir kílar í samstarvið millum londini. Og tí kunnu vit bara líta á tað arbeiðið, sum er farið í gongd, forðar fyri, at hetta hendir aftur, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður.

# Eingin niðurskurður í blokkinum

**Bæði løgmaður og forsætisráðharrin halda seg til tær avtalur, sum eru gjørdar um blokkstuðulin, og tí verður uppskotið um at minka blokkin fyri skuld ikki tikið upp í hesi syftu**

BLOKKSKURÐUR

*Ingi Rasmussen*

Eitt óvanligt uppskot kom frá Høgna Hoydal, varaløgmanni, beint upp undir fundin millum Anfinn Kallsberg, løgmanni, og Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra.

Høgni Hoydal, sum hevur umsitið sjálvstýrismál, skjeyt upp í opnum brævi til forsætisráðharran, at blokkstuðulin verður skerdur við einum triðingi, og afturfyri verður føroyska skuldin til Danmarkar strikað.

– Tað er rættiliga meinginsleyst, at vit á hvørjum ári skulu taka ímóti 616 milliónum krónum og so senda 323 milliónir krónur niðuraftur, segði Høgni Hoydal í brævinum.

Men formaðurin í Tjóðveldisflokkinum fekk onki ljóð fyri uppskotinum. Hvørki frá Anders Fogh Rasmussen ella Anfinn Kallsberg.

– Hatta gangi eg ikki við til, kann eg beinanvegin siga. Vit hava eina greiða avtalu við Føroya landsstýri, og hana ætla vit at halda. Avtalan snýr seg um, at føroyingar rinda skuldina aftur til danska statin, og eg ivist heldur ikki í, at hon verður afturgoldin. Í øðrum lagi er avtalað, at blokkstuðulin minkar í samsvari við yvirtøkur av málsøkjum, og tað halda vit okkum til, segði Anders Fogh Rasmussen.

Anfinn Kallsberg løgmaður var púra samdur við forsætisráðharran, hóast hann kundi tikið undir við tankanum frá sínum samgongufelaga.

– Skal blokkstuðulin minkast, so skal tað henda eftir samráðingar og ikki bara soleiðis hissini. Vit eru samd um blokkstuðulin, og at hann skal minkast við yvirtøkum. Men vilja vit broyta tann leistin, so kunnu vit taka spurningin uppaftur, næstu ferð vit samráðast um blokkin, segði Anfinn Kallsberg á tíðindafundinum.

Løgmaður avdúkaði samstundis, at uppskotið frá Høgna Hoydal upprunaliga var hansara, men beint nú er tað ikki viðkomandi.